# Reglugerð fyri nýtslu av kommunalum lendi
# til velting og aðra gróðurseting

**1.**

Vestmanna Kommuna letur lendi til velting og aðra gróðurseting – í fyrstu syftu verður talan um lendið omanfyri Grótbrotið í Stóragerði.
Lendið er býtt upp í teigar uppá góðar 100 fermetrar.

**2.**

Tá søkt verður um brúksrætt til lendi, skal hetta gerast skrivliga við frágreiðing um, hvat ætlanin er at velta ella gróðurseta á lendinum.

**3.**

Tá lendi er játtað sambært umsókn, verður lendið ávíst av umsitingini hjá kommununi.

**4.**

Treytirnar fyri brúksrætti av kommunalum lendi eru:

- at velt ella gróðursett verður sambært játtaðu umsóknini
- at brúksrætturin bert er galdandi fyri tað lendið, sum er ávíst av umsitingini hjá kommununi.
- at tað ikki er loyvt at hegna lendið inni
- at tað ikki er loyvt at gera bygning av nøkrum slag á lendinum
- at lendið verður væl umsitið og umgingið

**5.**

Brúksrætturin er galdandi í 5 ár. Um áhugi er at leingja brúksrættin, skal í góðari tíð, áðrenn brúksrætturin fer úr gildi, skrivliga søkjast um endurnýggjan við umsókn eins og greitt frá í grein 2.
Brúksrætturin kann til eina og hvørja tíð sigast upp av brúkshavaranum. Um brúksrætturin verður uppsagdur av brúkshavaranum, verður farið fram sambært grein 6.

**6.**

Er ikki áhugi at leingja brúksrættin, ella givist verður við at brúka lendið, áðrenn 5 ár eru liðin, skal lendið verða væl frágingið, tvs. øll gróðurseting burturbeind, og lendið slættað og flag lagt á, har flag er grivið til eitt nú eplavelting.
Verður hetta ikki gjørt, skilar kommunan sær rætt til at gera hetta fyri rokning hjá tí, sum brúksrættin hevur.
Kommunan skilar sær somuleiðis rætt til at geva øðrum brúksrætt til lendið, um hetta ikki verður brúkt í 2 fylgjandi ár. Tann, sum brúksrættin hevur, fær skrivlig boð um hetta.

**7.**

Kommunan skilar sær rætt til at taka brúksrættin aftur, um kommunan metir lendið at vera illa umsitið og umgingið. Í slíkum førum verður farið fram sambært grein 6.

**8.**

Brúksrætturin verður í fyrstu syftu ókeypis, men kommunan skilar sær tó rætt til at áseta brúksgjald. Um so skuldi verið, boðar kommunan brúkshavaranum frá hesum í góðari tíð frammanundan. Um kommunan velur at áseta brúksgjald, kann brúkshavarin siga brúksrættin upp. Í slíkum førum verður farið fram sambært grein 6.

Vestmanna Bygdarráð 30. mars 2022